# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Leiðari til viðgerðareindina »DAGLONIRNAR« á Psykiatriska deplinum

Til okkara nýggju viðgerðareind »Daglonirnar« á Psykiatriska deplinum, søkja vit eftir einum framsóknum og eldhugaðum leiðara.

Starvið er eitt fulltíðarstarv at seta frá 1. januar 2008 ella eftir nærri avtalu.

**Um Daglonirnar**
Daglonirnar er ein nýggj eind, sum skal samskipa og menna eitt framsøkið og dygdargott tilboð til ambulantar og innlagdar sjúklingar á Psykiatriska deplinum.

**Tær einstøku eindirnar eru:** Dagdeildin »Varðin«, Psykiatriskúlin, Fysioterapiin, Ergoterapiin, Barna- og ungdómspsykiatriin og uppsøkjandi psykosutoymi.



**Vit leita eftir einum ígongdsetara, sum torir at ganga nýggjar leiðir og er opin fyri nýggjum avbjóðingum,**
- at uppbyggja eindina og samskipa tvørfakligt viðgerðartilboð á deplinum
- at fyrireika og seta í verk nýtt virksemi
- at tryggja gott samstarv innanhýsis millum teir ymisku fakbólkarnar
- at tryggja gott samstarv við aðrar stovnar og samstarvsfelagar

**Leiðarin skal hava ábyrgdina av:**
- dagligu fyrisitingarligu-, fíggjarligu-, og fakligu leiðsluna av eindini
- viðgerðartilboðunum til teir innløgdu og ambulantu sjúklingunum
- at tryggja støðuga fakliga menning og eitt høgt tænastustøði
- at viðgerðartilboðini verða í tøttum samstarvi við tey tvørfakligu toymini
- at tann einstaki sjúklingurin verður settur í miðdepilin

**Vit kunna bjóða**
- eitt spennandi og mennandi og dynamiskt starv við nógvum avbjóðingum
- positivt tvørfakligt samstarv við nógvum eldsálum
- gott læringsumhvørvi við nógvum møguleikum
- ráðgeving frá einum eksternum arbeiðskonsulenti í eitt avmarkað tíðarskeið

**Vit vænta**
- at tú hevur viðkomandi fakliga útbúgving
- at tú hevur leiðsluútbúgving, tó ikki ein treyt, men skal so takast eftir setan
- at tú hevur leiðsluroyndir, ella hevur roynt teg í líknandi uppgávum
- at tú hevur royndir innan tað psykiatriska økið
- at tú megnar at vera nágreiniligur og samstundis hava nógvar bóltar í luftini
- at tú hevur góð evni at samskifta og samstarva
- at tú hevur góð evni at seta í verk og fylgja upp fyriskipanir
- at tú hevur gott yvilit og greiða talu
- at tú hevur góð evni at motivera og vísa fleksibilitet
- tætt samstarv við depilsleiðsluna

Nærri fæst at vita við at ringja til Tórmóð Stórá, læknafakligan depilsleiðara, tlf. 304500 lok. 4100, tost@lsh.fo ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur, lokal 4102, bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreist**
20. november 2007 kl. 12.00

## Starvsfólk til Vekslaran

Til vekslaran søkja vit eftir einum starvsfólki at arbeiða niðursetta tíð á starvsbrøki 0,68 til setan 1. desember 2007 ella eftir avtalu.

**Starvið snýr seg m.a. um:**
- telefonavgreiðslu
- leiðbeining til vitjandi
- postavgreiðslu
- skrásetingar

**Vit søkja eftir starvsfólk við:**
- samstarvsvilja
- sjálvstøðugleika
- ábyrgdarkenslu
- royndum innan økið

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og avbjóðandi starv
- eitt arbeiðspláss í menning
- at arbeiða saman við góðum og dugnaligum starvsfeløgum

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja 304503 ella 304500 til Jákup Nolsøe, deildarleiðara, lokal 1130.

**Umsóknarfreistin er mánadagin, 19. november 2007 kl. 12.00.**

## Deildarleiðara til B8

Eitt starv sum avloysari fyri deildarleið-ara á B8 á starvsbrøki 1,0 er leyst at søkja til setan 1. desember 2007 ella eftir avtalu til og við 30. september 2008.

B8 er ein nýumvæld medisinsk deild, sum tekur móti elektivum og akuttum med. sjúklingum við cardiologi sum sergrein. Ætlanin er í framtíðini, at deildin eisini fer at taka móti sjúklingum við akuttum apoplexi.

Deildarleiðarin hevur innan tað sjúkra-røktarfakliga øki tilvísing til leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin á Medisinska deplinum. Ætlanin er at implementera THS primo 2008. Card. eftirutbúgving byrjaði á deildini í februar 2007.

**Deildarleiðarin hevur m.a. ábyrgd av:**
- sjúkrarøktini
- dagligu leiðsluni
- fakligu menningini
- fíggjarstøðuni

**Vit bjóða:**
- innleiðslu
- fakliga kompetentar starvsfelagar
- fjølbroyttar avbjóðingar
- ávirkan á fakliga menning

**Krøv til umsøkjarar:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- drúgvar fakligar royndir innan medisinska økið
- áhuga fyri fakligari mennning av starvsfólkum
- royndir og hug til leiðslu
- visiónir, sjálvstøðugur og kreativur í arbeiðnum

Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava leiðsluroyndir og/ella cardiologiska eftirútbúgving.

Starvslýsing og meira fæst við at ringja 304500 til Marjun Thomsen, deildarleiðara, lokal 6068/6008 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 12. november 2007 kl. 12.00.**

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

· er sjúklingurin í miðdeplinum
· eru umleið 200 seingjarpláss
· eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
· eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
· eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
· er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo